# Hugsa føroyskt – les føroyskt

**Í ár tekur Fróðskaparsetur Føroya aftur upp lesandi til greinina, ið eitur norðurlendskt – serliga føroyskt og bókmentir. Turið Sigurðardóttir, lektari á Fróðskaparsetrinum sigur, at stórur áhugi er fyri hesum námið, og tað eru nógv sum søkja**

HÆGRI LESTUR
*Ingrid Bjarnastein*



*Hetta er ein partur av teimum, ið hava lisið til exam.art seinastu tvey árini. Tó ikki allur flokkurin, tí restin var ikki rættiliga liðugur tá myndin varð tikin.*
*Aftast fv: Maiken Poulsen, Vónbjørt tróndheim, Hanna Simonsen og lærarin í bókmentum, Turið Sigurðardóttir*
*Fremst fv: Tórun L. Samuelsen, Mirjam Joensen, Sólva Jónsdóttir og Randi Kúrberg*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Annað hvørt ár verður næmingar tiknir inn á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya. Og í ár verður aftur tikið upp, júst sum fyri tveimum árum síðani.

– Henda útbúgvingin tekur tvey ár, og eftir tvey ár hevur tú fingið exam.art, sum er ein hjágrein á universitetstigi, sigur Turið Sigurðardóttir, lektari á Fróðskaparsetrinum.

Hjágreinin eitur norðurlendskt, serliga føroyskt og bókmentir, og verður størsti denturin lagdur á føroyskt og bókmentir, har føroyskt verður sett inn í eitt norðurlendskt høpi.

– Tað eru nógv, sum velja hesa útbúgvingina. Og eftir hesi tvey árini ber til at lesa víðari til cand.phil, sum síðani er ein høvuðsgrein. Aftaná hetta ber til at taka eina hjágrein og gerast cand.mag, greiðir Turið Sigurðardóttir frá.

Tvey tey fyrstu árini geva førleika til at undirvísa í føroyskum í miðnámsskúlum, og ber eisini til at fáa hesi bæði árini yvirførd til Danmarkar ella onnur lond, um ein skuldi havt hug til at lisið okkurt annað víðari aðrastaðni enn í Føroyum.

### Summarskeið

Umframt at kunna bjóða út júst hesa útbúgvingina, ber eisini til at taka summarskeið í øðrum Norðanlondum.

– Vit eru í einum norðurlendskum samstarvi um summarskeið. Til ber hjá teimum lesandi at taka eitt summarskeið í norðanlondunum, og í Føroyum hava vit eisini skeið fyri norðurlenskum studentum, sigur Turið.

Men á setrinum verður bert tikið upp annað hvørt ár. Grundina til hetta sigur Turið vera arbeiðsorku og plásstrot. Tí varð hildið, at tað var meira passaligt bara at taka inn annað hvørt ár.

Eisini vil lektarin vera við, at stórur tørvur er á føroyskt lærarum í miðnámsskúlnum kring landið.

Fyri at gerast exam.art skal ein lesa í tvey ár. Hesi bæði tvey árini eru býtt sundur í eina rúgvu av greinum, og skal tann lesandi taka allar hesar greinar, tí tær eru ein bundur partur av náminum. Umleið helvtin er málslig, meðan hin helvtin er bókmentalig.

Undirvíst verður millum annað í norrønum, málsøgu, málløru, ljóðfrøði, skaldskapi av mannamunni, samskifti og so framvegis. Greinirnar eru bæði størri og smærri, har tær smærru greinirnar verða brúktar sum eitt amboð í lestrinum.

Um tú hevur hug at søkja inn á Fróðskaparsetrið til útbúgvingina, ið eitur norðurlendskt – serliga føroyskt og bókmentir, er at skunda sær. Freistin er nevniliga úti mánadagin, 1. juli. Einasta krav er, at tú hevur studentsprógv ella líknandi útbúgving.







## Bilur til sølu



Volvo S40. Eykaútgerð: blackline pakki, sportline pakki, tvey sett av 16" sportsfelgum, árg. jan. 2002. Nývirðisprísur 290.000 kr., til sølu fyri uml. 250.000 kr. Bilurin 4x4 kann takast í býti.

**Tlf. 225078**




# Fara at fylgja væl við

**Jóannes Eidesgaard er vónbrotin av, at Strandferðslan ikki fekk ta eykajáttan hon bað sum, so at hon kundi tryggjað suðuroyingum álítandi ferðasamband í vetur**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*

– Tað er eitt vónbrot, at Landsstýrið ikki vildi játta Strandferðsluni tað eykajáttan, hon bað um, so at hon kundi tryggja suðuroyingum eitt álítandi ferðasamband í vetur - les eisini aðra grein her á síðuni.



*Javnaðarflokkurin fer at fylgja væl við gongdini, sigur Jóannes Eidesgaard*

Hann sigur, siglingin hevur verið óreglulig í fleiri vikur í vár og verður hon heldur ikki álítandi í vetur, verður tað ótolandi, bæði fyri vinnulív og ferðafólk.

Hann sigur, at hetta er ein harmilig støða og at javnaðarflokkurin fer at fylgja sera gjølliga við gongdini.

Hann er staddur uttanlands í løtuni hevur tí ikki sett seg inn í málið til fulnar.

Men hann átalar at ferðasambandið til og úr Suðuroynni verður gjørt til ein spurning um pening.

– Tað er ein tænasta til ein týðandi part í samfelagnum og so mugu vit góðtaka, at tað kostar, tað tað kostar at hava hetta sambandið álítandi og trygt, sigur hann.

Hann veit ikki, hvat javnaðarflokkurin fer at gera við málið, men hann ásannar, at møguleikarnir eru smáir tí andstøðan hevur lítlan og ongan møguleika at fáa mál í gjøgnum í tinginum.

Hann hevur eisini lagt til merkis, at stjórin á Strandferðsluni hevur sagt, at støðan, sum er íkomin, er m.a. ein avleiðing av vánaligari politiskari leiðslu í áttati árunum og upp í nítiárunum.

– Tað tykist sum um móti er komin í at geva áttatiárunum skyldini fyri alt, sum ikki gongur eftir vild. Sjálvandi átti meiri peningur at verið settur av tí at skifta strandfaraskip út fyri. Men tað reingir ikki tann veruleika, at orsøkin til trupulleikarnar, vit hava staðið í seinastu árini, er at Sjálvstýrisflokkurin seldi Teistan fyri nøkrum árum síðani við dyggum stuðli frá sambands- og fólkaflokkinum.

– Tá misti Strandferðslan avloysaraskipið, sum kundi givið suðuroyingum eitt álítandi ferðasamband, tá ið Smyril ikki er tøkur.

Jóannes Eidesgaard sigur, at hann hevur frætt, at Landið fekk 12 milliónir fyri Teistan. Men hann heldur, at hetta hevur kosta samfelagnum mangt slíkt, at hann varð seldur, bæði í mistari inntøku til Strandferðsluna tí ongin hevur siglt við teimum vánaligu avloysaraskipunum, sum hava verið, men eisini hevur tað kosta vinnulívinum nógv, at sambandi ofta hevur verið so tvørligt og fyri ikki um at tala alt tað, sum er goldið fyri avloysaraskip í heilum hesi árini.

# Á Tvøroyri standa tey við sítt

**Verður siglingin hjá Smyrli løgd lamin í vetur, sum vandi er fyri, skal avloysaraskipið ikki vera verri enn Smyril, tí so verður trupult hjá tí at fáa kajpláss á Tvøroyri**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*



*Tvøroyrar Kommuna ætlar framvegis ikki at góðtaka, at eitt skip, sum er verri enn Smyril, verður sett í sigling til og úr Suðuroy. So fara stabilisatorarnir á Smyrli, so sum vandi er fyri, nyttar onki at koma við dúgvbuni, soleiðis sum gjørt varð, tá ið Smyril var í dokk í vár*

Verður siglingin hjá Smyrli løgd lamin í vetur, soleiðis sum vandi er fyri, fer Tvøroyar Býráð ikki at lata sær lynda, at eitt avloysaraskip verður sett í sigling, sum er stórvegis verri enn Smyril.

Tvøroyrar Kommuna hevur seinasti árini havt ein ógvuliga virknan leiklut sambandi við ferðasambandið ímillum Suðuroynna og Havnina og hevur sett krøv til skipini.

Eitt nú hevur býráðið noktað Dúgvuni atløgupass, tá ið hon varð sett í siglingina av avloysa Smyril

Og Finnleif Guttesen, borgarstjóri, sigur, at enn eru als ongi tekin til, at býráðið ætrlar sær at broyta kós í hesum máli.

Nú er støðan tann, at brek er á stabilisatorunum á Smyrli og vandi er fyri, at teir fara. Hendir tað, verður tungur flutningur bara førdur í góðum veðri, tí tá fer Smyril at rulla so illa, at tað eru óráð at føra treylarar og annað stórt og tungt, uttan í góðum veðri. Samstundis verða umstøðurnar hjá ferðafólki munandi verri.

Fara stabilisatorararnir, er tí vandi fyri avlysingum og skerdum flutningi, alt eftir, hvussu veðrið verður í vetur.

Fyri at binda um heilan fingur og tryggja álítandi flutning um Suðuroyarfjørð í vetur, mælti Strandferðslan og landsstýrismaðurin í vinnumálum til, at Smyril verður lagdur í heyst og at eykajáttan verður latin, so at Strandferðslan kann leiga eitt hóskandi avloysaraskip, Mett varð, at brúk var fyri góðum níggju milliónum í ár og eini upphædd næsta ár, sum er ókend, men sum í ringasta føri eisini verður góðar níggju milliónir.

Men hesum tók Landsstýrið ikki undir við og tí má Smyril halda fram við siglingini í vetur í vónini um, at stabilisatorarnir halda.

### Fer at taka málið upp

Finnleif Guttesen, borgarstjóri á Tvøroyri, sigur, at at Tvøroyrar Býráð fer neyvan at broyta støðu í hesum máli.

– Tá ið Smyril var í dokk í vár, noktaði býráðið Dúgvuni atløgupláss á Tvøroyri.

Men tað metti lógmálaráðið í Landsstýrinum ikki, at býráðið hevði heimild til og intil ein endalig støða varð tikin, varð avgerðin hjá býráðnum sett úr gildi. Tað endaði so við, at Ein trolari kom at liggja á Drelnesi, so at Dúgvan ikki slapp at har. Ístaðin mátti hon liggja við hekkuni at og skipinum út á sjógv, so at bilar og fólk fingust í land, men tað er bara ein loysn sum kann brúkast í góðum veðri.

Annars er endaliga avgerðin hjá Lógmálaráðnum ikki tikin enn!

Men býráðið ætlar ikki at slaka í spurninginum.

– Verður endaliga niðurstøðan, at vit ikki hava heimild at nokta Dúgvuni atløgupláss, gerst onki við tað.

– Men tað er so skjótt, at havnin á Drelnesi kann verða upptikin av øðrum skipum, so at Dúgvan ikki sleppur at har, leggur hann afturat. Og verður skip sett í sigling, sum er eitt afturstig fyri Suðuroyingar, verður havnin á Drelnesi upptikin!

Hann sigur, at enn fevnir forboðið hjá býráðnum bara um Dúgvuna.

– Men eg síggi onga meining í at forða Dúgvuni at leggja at og so at lata okkurt annað skip, sum er líka vánaligt, sleppa at. So eg ivist ikki í, at verður talan um at seta eitt avloysaraskip í sigling, sum er verri enn Smyril, verður tað sama galdandi, sum fyri Dúgvuna.

Borgarstjórin á Tvøroyri ivast heldur ikki í, at Býráðið fer at taka málið upp

– Tað kann ikki góðtakast, at suðuroyarsiglingin aftur nú skal vera í vanda fyri skerjingum. Og tað er ongantíð ov tíðliga at fáa greiði á viðurskiftunum, sigur hann.

## Fara aftur at taka ímóti ull

**Ullvirkið í Vági fer nú at taka ímóti ull í býti fyri vørur**

ULLVIRKIÐ
*Áki Bertholdsen*

Ullvirkið í Vági fer nú aftur at taka ímóti ull.

Í tíðindaskrivi sigur ullvirkið, at tað fer at lata upp til 10 krónur fyri kilo av turrari, vælskildari ull. Prísurin er eftir, hvønn lit, ullin hevur, fyri hvíta ull verður latið seks krónur kilo, fyri gráa ull, tvær krónur kilo, fyri myrkamorreytt, fýra krónur fyri kilo, fyri ljósamorreytt, 10 krónur fyri kilo og fyri óskilda ull fýra krónur fyri kilo. Fyri vrakull er ongin prísur.

Ullvirkið sigur, at ullin verður latin í býti við vøru frá ullvirkinum eftir omanfyrinevnda prísi.

Eigarin ber sjálvur kostnaðin av flutninginum til ullvirkið.Goldið verður fyri nettovekt og hvør sekkur skal merkjast týðiliga við avsendara. Tikið verður ímóti ull frá 1. august til 1. oktober.

Í bløðunum í gjár lýsti Ullvirkið eftir fólki til ullmóttøkuna.

Àrni Brattaberg sigur, at hesi fimm árini, síðani ullvirkið byrjaði, hava víst, at tað ber til at gera mótavørur burturúr samfingnari, føroyskari ull.

Men prísurin á ullini er beinleiðis tengdur at, hvat fæst burtur úr ullini og tað er bara í Íslandi og í Noregi, at ullin gongur í góðum prísi, men tað er tí at har verður stuðul latin.

– Alla aðrastaðni í Evropa er hann so vánaligur, at tað er ikki fyri meiri enn fyri útreiðslur til royting.

Ullvirkið hevði vónað, at landið fór at skipa fyri eini innsavning av ull, men tað eru ongi útlit fyri, at tað verður til nakað, tí fer Ullvirkið sjálvt undir eitt átak nú í summar.

## Ruth er úr Lopra



*Í greinini um studentarnar, sum hava tikið prógv í Suðuroy í ár, er tað eina navnið tíverri komið skeivt fyri.*
*Vit skrivaðu at Vígdis Ruth Magnusdóttir Jacobsen var úr Hvalba.*
*Tað er hon ikki, hon er úr Lopra.*

*-Áki-*